# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og stuðul, tá

**Dánjal Johan Johansen**
Strendur

doyði og varð jarðaður.

Takk øll tit, sum hjálptu og stuðlaðu honum, meðan hann var sjúkur.

*Fyri familjuna*
**Marita**

## Dagurin í morgin

**2. november. Bibiana**, deyð umleið ár 1367. Dóttir ein keisarligan embætismann, Flavianus. Tá ið tað upp, at dótturin var kristin, vórðu øll í húsinum tikin av døgum. Bibiana stendur summastaðni skrivað Viviana.

Bianco Footwear:

# Lýsingarrøð elvir til orðaskifti

**Nógv hava undrast á løgnu lýsingarnar og plakatirnar hjá Bianco Footwear í Handilskjarnanum í Havn við naknum skapningum, ið eru hálv menniskju og hálv ross. Talan er um eina skemtiligа og orðaskiftiselvandi lýsingarrøð, verður sagt frá Handilskjarnanum**




*Oddny Clementsen, leiðari í Bianco Footwear í Handilskjarnanum, og Óluva D. Persson, starvsfólk í handlinum*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**LÝSINGARRØÐ**

Um vit menniskju høvdu fýra bein, hevði tørvurin á skóm verið tvær ferðir so stórur sum hann er í dag. Bianco Footwear hava spælt sær við tankan um eina blanding av menniskjum og djórum.

Bianco Fottwear eru kendir fyri sínar øðrvísi lýsingarherferðir. Í so máta er hendan nýggja lýsingarherferðin einki undantak. Teir hava fyrr elvt til orðaskifti um alt frá kynsbýti til plastiska skurðviðgerð og fóru seinast í hernað fyri ítróttarminnilutar við einum stuðulstiltaki fyri kropsbygning og synkronsvimjing.

Hesaferð hevur Bianco spælt sær við myndasnøgging og skapt eina »genetisk handfarna« lýsingarrøð. Lýsingarnar, ið bera heitið »Genetic Engineering«, mynda eitt vakurt framtíðarsamfelag við sagndjórinum "kentaurinum" í høvuðsleiklutinum.

Myndirnar vísa vakrar og hálvgum gudalíkar skapningar, ið eru hálv menniskju og hálv ross – við fýra beinum og harvið tørvi á einum eyka skóm ella styvlum.

Hans Waag, stjóri í Handilskjarnanum, sigur um hesa lýsingarherferðina: »Vit vilja sjálvandi fegin vísa heystúrval okkara av skóm og styvlum, men samstundis nýta vit høvið at birta upp undir kjak – av tí skemtiliga slagnum. Vit eru ein partur av mótaídnaðinum, ið ber stóra ábyrgd fyri hvussu vit skulu síggja út. Lýsingin viðger hetta evni á skemtiligan hátt, og Bianco Footwear vónar, at tað birtir upp undir kjakið – eisini millum vanlig fólk.

»Ein kann lættliga ræðast framtíðina við ílegutøknini, og tað lættasta er at lata eyguni aftur fyri teimum etisku trupulleikunum, ið stinga seg upp. Hetta evnið er rúgvusmikið og ilt at skilja, men kjakið er sera týdningarmikið. Tøknin gevur møguleikar, men vit skulu avgera hvussu vit vilja nýta hesar møguleikar – og serliga hvussu vit ikki vilja nýta teir«, sigur Hans Waag at enda.



*Nógv hava undrast á løgnu lýsingarnar og plakatirnar hjá Bianco Footwear í Handilskjarnanum í Havn*




HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ
Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**
Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin
"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo




Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við